# Bókadagurin 2001



*Carl Johan Jensen var millum teir rithøvundarnar, sum lósu upp á bókadegnum*



*Ein av teimum nýggju í føroyska bókaheiminum er Elias Askham. Hann las á bókadegnum eina av sínum stuttsøgum*

**Tað mesta av sunnudegnum var Norðurlandahúsið fylt við rithøvundum, áhoyrarum, upplestri og bókum – nógvum bókum. Árligi bókadagurin, sum Rihøvundafelagið og Norðurlandahúsið í felag skipa fyri, varð hildin sunnudagin**

BÓKADAGUR
*Orð og myndir:*
*Heri á Rógvi*

Seinasta fríggjadag vóru vinnudagar í Norðurlandahúsinum. Sunnudagin rakti eitt nýtt rák Norðurlandahúsið, tá ið árligi bókadagurin stóð á skránni. Hesin eini dagurin um árið hevur áður verið hildin tíðliga á heystið, men er fluttur nakað longur út á árið. Bókadagurin er rætt og slætt eitt forkunnugt og sermerkt høvi. Hendan eina dagin um árið hittast rithøvundar og áhugaði til nakrar tímar, har bøkurnar eru settar í hásæti.

Í ár varð bókadagurin hildin sunnudagin í Norðurlandahúsinum. Rithøvundafelagið, sum í dag telur einar 100 limir, og Norðurlandahúsið skipaðu í felag fyri degnum, ið eisini var heilt hampuliga væl vitjaður. Eini hundrað fólk vóru gestir í Norðurlandahúsinum, tá tað vóru mest.

Bókadagurin byrjaði kl. 15 og hildið varð á til kl. 18. Bókadagurin í ár var skipaður eitt sindur øðrvísi enn okkurt árið framman undan. Gunnar Hoydal, formaður í Rithøvundafelagnum, greiðir frá, at teir í ár royndu at gera bókadagin meira livandi, har forumið var rættiliga café kent.

Bókadagurin var skipaður soleiðis, at bæði forhøllin og klingran í Norðurlandahúsinum vórðu tikin í nýtstlu. Upplestur var tað, sum einamest merkti skránna. Tað var skipað soleiðis, at við seks ymisk høvi lósu tveir rithøvundar upp ávíkavíst í forhøllini og Klingruni. Hetta merkti so, at fólk kundu sjálvi velja, hvørjum tey vildu lurta eftir. Upplesararnir umfataðu bæði meira og minni kendar føroyskar rithøvundar. Millum teir meira kendu rithøvundarnar vóru Oddfríður M. Rasmussen, Carl Jóhan Jensen og Oddvør Johansen. Hini, sum lósu upp, vóru Elias Askham, Malan Poulsen og Marjun Kjelnæs. Oddvør Johansen kundi á bókadegnum eisini leggja fram sína nýggjastu bók, sum hevur tað heldur sermerkta heitið, Tá ið eg havi málað summarhúsið. Umframt at lesa upp, so slap Oddvør Johansen eisini framat í einari samrøðu. Guðrun Gaard, sum í løtuni er í ferð við at skriva eina Phd. ritgerð, spurdi á bókadegnum Oddvør Johansen ymisk um hana og hennara skaldskap.

Marjun Kjelnæs og Elias Askham hoyra bæði til tað nýggja ættarliðið av føroyskum rithøvundum. Teirra stóra gjøgnumbrot hava verið stuttsøgukappingarnar, sum hava verið fyriskipaðar seinastu tíðina.

Gunnar Hoydal heldur tað verið áhugavert, at tað yngra ættarliðið av føroyskum rithøvundum eisini velur at skriva prosa.

Felags fyri allar rithøvundar er at teirra størsta søluhøgtíð nærkast. Gunnar Hoydal sigur, at jólini eru lívsæðrin hjá forløgunum heldur enn sjálvum rithøvundum, tá ið tað ikki gevur nakað stórvegis av pengum at vera rithøvundur í Føroyum.

- Sum støðan er nú, so eru fleiri av forløgunum rættiliga illa fyri, og í ár eru eisini komnir færri bøkur enn í fjør, sigur Gunnar Hoydal.

Eftir hvat skilst, er tað trupult at fáa neyðuga stuðulin til bókaútgávur.

Á bókadegnum var bókasølan í SMS eisini umboðað.



*Áhoyrarnir hugnaðu sær óført sunnudagin í Norðurlandahúsið*



*Eingin bókadagurin uttan eina bókasøla*



# ILA-laksurin verður nú tikin

**Tað fer at taka tvær vikur at tøma ringin við sjúka fiskinum hjá Faroe Salmon. Felagið ætlar at taka fiskin í øllum teimum 9 ringunum í Hvannasundi sum skjótast**



*Deyði ILA-fiskurin hjá Faroe Salmon verður tikin upp á land í Hvannasundi. Laksurin verður koyrdur í tangar og skal beinast burtur*

ILA
*Eyðun Klakstein*

Faroe Salmon er nú farið undir at taka laksin í ringinum, har ILA varð staðfest í farnu viku.

Slaktið kann ikki fara fram á vanliga virkinum, har Faroe Salmon og East Salmon virka sín fisk, men arbeiðið er flutt til Northern Fish Cold Storage í Klaksvík, sum hevur fingið góðkenning til arbeiðið við ILA-laksinum.

Nógvur laksur er deyður í ringinum, har ILA varð staðfest.

– Tað eru eini 500 tons í ringinum, og vit hava mist eini 100 tons, og tað doyr framhaldandi nógvur fiskur, sigur Heini Gregersen, sum er annar eigarin av Faroe Salmon.

## Fleiri fólk til arbeiðis

Fiskurin, sum doyr í ringinum, skal burturbeinast, men tann fiskurin, sum verður tikin, kann seljast.

Alt vikuskiftið á tamb hevði Faroe Salmon fólk til arbeiðis fyri at taka sær av deyða fiskinum. Hesin fiskurin varð tikin upp á land í Hvannasundi, har hann skuldi fáast í tangar og beinast burtur.

Vanliga arbeiða fýra mans í Hvannasundi, men um vikuskiftið vóru eini 12 fólk til arbeiðis.

## Missa óneyðugan fisk

Tað fer at taka einar tvær vikur at tøma ringin við sjúka fiskinum, og tað er long tíð, tá fellið í ringinum er so stórt.

– Vit missa óneyðuga nógvan fisk, tí vit ikki kunnu slakta skjótari, sigur Heini Gregersen.

Faroe Salmon byggir saman við East Salmon nýtt kryvjivirki í Klaksvík. Hetta virkið er komið væl áleiðis, men verður ikki klárt fyrr enn móti várið. Hevði hetta virkið verið liðugt, kundi ringuin við sjúka fiskinum verið tømdur eftir trimum døgum.

Sum er verða eini 250 tons av laksi slaktað um vikuna, men nýggja kryvjivirki fer at klára um 100 tons eftir átta tímum.

## Slakta alt

Faroe Salmon hevur 9 aliringar í Hvannasundi, og laksur í góðari stødd er í teimum øllum. Talan er um 900.000 fiskar yvir fýra kilo.

Átta ringar liggja tætt at hvørjum øðrum, meðan tann 9. ringurin liggur eitt sindur burtur frá hinum ringunum. Tað er í hesum ringi, at ILA er staðfest.

– Tá vit eru lidnir at tøma ringin við sjúka fiskinum, ætla vit beinanvegin at fara undir at taka fiskin í øllum hinum ringunum eisini. Nú er ILA staðfest í eina ringinum, og tí kann væntast, at sjúkan spreiðir seg til hinar ringarnar eisini, sigur Heini Gregersen.

– Um ILA verður staðfest í øllum hinum ringunum eisini, og fellið verður eins stórt har, sum tað hevur verið í sjúka ringinum, so fer tað at kosta okkara felag nógv, sigur hann.

# Trøll á sjónbandi

**Trølla Pætur og Trølla Omman eru høvuðsleikarar í nýggjum sjónbandi, sum verður at fáa til keyps fyrst í desember mánaði**

FILMUR
*Eyðun Klakstein*

Um góðar tvær vikur verður nýtt føroyskt sjónband givið út. Tað eru Trølla Pætur og omma hansara, sum eru høvuðsleikarar í hesum sjónbandi, og tað hendir mangt og hvat, tá tey fara til Grønlands at leita eftir Nósa.

Løgreglan er í hølunum á teimum báðum trøllunum, sum nýta allar snildir fyri at sleppa undan lógarinnar langa armi. Tey lána speedbát, tyrlu og flogfar, og tá er ikki lætt hjá løgregluni at fylgja við.



*Trølla Omman saman við grønlendskum børnum*

Søgugongdin í filminum er, at Trølla Pætur og Trølla Omman skulu vitja Nósa. Hann er farin til Grønlands, har Kular Røtur hava konsert, og so leggja trøllini leiðina til Grønlands fyri at finna Nósa.

Filmurin er 50 minuttir til longdar, og upptøkurnar vóru gjørdar í summar og í heyst.

Fyrst í komandi mánaði fæst sjónbandið til keyps kring landið.

# ILA hóttir alirisan

**Faroe Salmon, sum nú eisini stríðist við ILA-sjúkuna, er ein risi í føroyskari aling. Felagið hevur virksemi á fýra ymiskum økjum í Norðoyggjum og byggir í løtuni nýtt og framkomið kryvjivirkið í Klaksvík**

FAROE SALMON
*Eyðun Klakstein*

Faroe Salmon í Klaksvík varð stovnað í 1985, tá felagið framleiddi 60 tons av laksi. Síðani hevur framgongdin hjá felagnum verið støðug, og í fjør útflutti felagið 8000 tons av laksi, sum høvdu eitt virði upp á 150 milliónir krónur.

Ætlanin hjá felagnum hevur verið at økja framleiðsluna upp í 12000 tons um árið, men hendan ætlan hevur fyribils fingið eitt bakkkast orsaka av ILA-sjúkuni, sum er staðfest í einum ringi hjá felagnum.

Faroe Salmon keypti í 1999 Polarlaks, og síðani hevur Faroe Salmon havt alivirksemi á fýra ymiskum økjum í Norðoyggjum – á Borðoyavík, við Kunoyarnes, í Haraldsundi og í Hvannasundi.

Felagið hevur skipað sítt virksemi soleiðis, at eitt av økjunum altíð liggur stilt.

## Byggja nýtt virki

Fyri at tryggja sær nóg mikið av smolti fór felagið undir sína egnu smoltstøð í 1999. Hendan støðin liggur í Kalsoynni.

Í løtuni er Faroe Salmon í holt við at byggja eitt stórt kryvjivirki saman við hinum alifelagnum í Norðoyggjum, East Salmon. Hetta virkið skal eftir ætlan takast í nýtslu nakrar mánaðir inn í nýggja árið. Hetta virkið skal kunnu slakta 15000 tons av fiski um árið, fer at lúka øll nýggj krøv til fiskaframleiðslu og kostar um 30 milliónir krónur at byggja.

Umleið 30 fólk starvast hjá Faroe Salmon, sum í fjør hevði eitt tað besta úrslitið í føroyskum vinnulívi at vísa á.